# Biker og bíbliur saman í Vesturkirkjuni

**Hvat hava motorsúkklur, Holy Riders og ein gudstænasta til felags? Henda spurningin fæst eitt fullgott svar uppá leygardagin í næstu viku, tá ein serstøk MC-gudstænasta verður hildin í Vesturkirkjuni**

MOTORSÚKKLUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Victor Carlsen (í miðjuni) fegnast um samstarvið við báðar prestarnar í Vesturkirkjuni – Hera Joensen vinstrumegin og Bergur D. Joensen høgrumegin*

Mynd: Snorri Brend

**Havn:** Fyri tey mongu motorsúkklu-áhugaðu verður hetta komandi árið sera spennandi.

Í Føroyum finnast ein hópur av hesum motorsúkklum, og tær gerast bara fleiri og fleiri.

So seint sum í farnu viku kom ein sera snøgg Harley-Davidson til landið. Aðrar munnu helst vera ávegis eisini, nú avgjøldini á teimum lækkaðu við ársskiftið.

Fyrsta tiltakið fyri tey MC-áhugaðu verður leygardagin í næstu viku, tá ein sonevnd "MC-gudstænasta" verður hildin í Vesturkirkjuni í Havn.

Tað er nýggja tvørkirkjuliga motorsúkklufelagið "Holy-Riders MC Føroyar", sum var stovnað í august mánað í fjør, sum tekur stig til hesa gudstænastuna leygardagin 18. februar kl. 18.

### Úr øllum landinum

Victor Carlsen, sum er formaður í nýggja felagnum sigur, at teir sjálvandi vóna at veðrið verður teimum til vildar henda dagin.

– Um viðrar, so er ætlanin at skipa fyri felagskoyring allan vegin úr Norðoyggjum, Eysturoynni, Vágum og úr Suðurstreymi til hesa gudstænastuna, sigur hann.

Nærri verður kunngjørt, hvar koyrt verður frá í teimum ymsu oyggjunum.

Henda gudstænastan verður skipað í samstarvi við bisp og prestarnar við kirkjuna – Bergur D. Joensen og Hera Joensen. Teir hava somuleiðis víst tiltakinum stóran áhuga.

Henda serstaka gudstænastan fer at hava ymiskt spennandi á skránni.

Umframt felagssang, talu og andakt, fer vælkendi Kim Hansen sum solistur at framføra tveir sangir. Somuleiðis fara vælkendu Carlsen-systkini Vanja, Laila, Barbara og Finnur at syngja tveir sangir.

Okkurt annað verður eisini afturat, sum enn ikki er endaliga avtalað.

### Biker-Bíblia

Vælkenda "Biker-Bíblian", sum nú í nøkur ár hevur verið eitt amboð til kristniboðan millum MC-fólk, verður eisini umrødd og víst fram á gudstænastuni.

Ætlanin er eisini at býta hana út til tey, ið hava áhuga fyri henni.

"Biker-Bíblian" er eitt danskt Nýggja Testamenti við stuttum vitnisburðum, sum persónar í MC-umhvørvinum uttanlands hava skrivað. Umframt hetta eru upplýsingar um kristiligar motorsúkklufelagsskapir runt allan heimin, og aðrar lýsingar, ið hava við MC-umhvørvið at gera.

– Fyrsta upplagið uppá 10.000 eintøk fer nú at ganga undan, so undir gudstænastuni fer talvan at ganga sum stuðul til endurútgávu av teirri donsku "Biker-Bíbliuni", sigur Victor Carlsen.

# Klaksvíkingar fáa ein nýggjan peningastovn

**Mánadagin 20. februar fáa peningastovnarnir í Klaksvík kapping frá Føroya Sparikassa. Longu fríggjadagin 17. februar verður móttøka í KÍ-Caféini, og sunnudagin 19. februar verður eitt stórt barnatiltak í KÍ-høllini**

PENINGASTOVNAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Føroya Sparikassi letur nú upp nýggja deild í klaksvík, og tað fara klaksvíkingar helst at leggja væl til merkis.

Upplatingardagurin í Bøgøtu 12 verður mánadagin 20. februar, og dagarnar uppundir upplatingina verður skipað fyri tiltøkum bæði fyri stór og smá.

Hóast sparikassin ikki alment er latin upp enn, er kortini líkt til, at klaksvíkingar taka væl ímóti nýggju deildini hjá Sparikassa.

Hinvegin so ætla norðoyingar eisini at gera vart við seg í Havn, tí í næstum fer Norðoya Sparikassi at lata upp eina deild í høvuðsstaðnum.

### Longu væl móttikin

Í Føroya Sparikassa gleða fólk seg til at lata deildina í Klaksvík upp.

Tað man kortini vera tann nýggi deildarleiðarin, Eyðun Mørkøre, ið sjálvur er klaksvíkingur, sum er mest spentur uppá hetta.

– Vit eru til reiðar at fara undir uppgávuna, sum tað er at reka eina deild í Klaksvík. Tað gleðiliga er, at klaksvíkingar longu hava tikið væl ímóti okkum.

– Vit hava longu fleiri nýggjar kundar í Klaksvík, sigur hann.

Áhugi er bæði fyri sethúsafígging, vinnulívsfígging, virðisbrøvum og øðrum tænastunum, sum Føroya Sparikassi fer at bjóða kundunum.

# Nýggjur brandbilur loysir gamalt mál



*Sørvingar hava fingið nýggjan brandbil*

**Sørvágur:** Á bygdaráðsfundi í farnu viku samtykti bygdaráðið at keypa nýggjan brandbil til kommununa.

Málið at keypa nýggjan brandbil til kommununa hevur verið frammi í eini 8 – 10 ár. Kostnaðurin er 1,7 mió. kr

Avgerðin byggir á tilmæli frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini um at keypa brandbilin frá VR bilar og HMK Ringe.

Kristian Olsen, Arnjohn Hvítklett og Eivin H. Jacobsen hava ráðgivið kommununi í samband við keypið.

**sb.**

# Nógv tiltøk í leguhúsinum

**Vatnsoyrar:** Aftur í ár bjóðar leguhúsið Zarepta til ein hóp av tiltøkum bæði fyri børn, ung og tilkomin.

Fyrsta av legunum, sum leguhúsið skipar fyri byrjar longu hósdagin í hesi vikuni. Hetta er ein lega fyri brekað, og sum varir fram til sunnudagin. Og soleiðis verður hildið á restina av árinum.

Íalt verða 22 legur, skeið og stevnur fyriskipað í ár. Tær flestu verða í summar, tá tær vælumtóktu summarlegurnar verða á skránni.

Annars var Zarepta væl fylt av ungfólki úr samkomuni Ebenezer um vikuskifti. Henda vikuskiftislegan varð m.a., hildin saman við tveimum trúboðarapørum, sum høvdu áhugaverdar tímar fyri teimum ungu, sum mundu vera um 200 í tali hesar dagarnar.

**sb.**

# Svimjihøllin letur uppaftur í dag



*Svimjihøllin í Klaksvík letur nú uppaftur, til gleði fyri bæði kappsvimjarar og tað vanliga fólkið*

**Klaksvík:** Hesa seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at skifta út ketilin í svimjihøllini. Arbeiðnum líður so mikið væl, at tað nú skuldi verið liðugt, soleiðis at klaksvíkingar aftur kundu sleppa at svimja í dag.

Skiftingin av ketlinum hevur verið upp á tal í eina tíð. Trupulleikar av tí gamla gjørdu tað neyðugt at gera arbeiðið beinanvegin, og tí varð neyðugt at stongja høllina eina tíð.

Hetta var sjálvandi óheppið, m.a. fyri kappsvimjararnar í svimjifelagnum Ægir, men hesi hava roynt at bøtt um støðuna við at venja í Leirvík og í Gøtu.

Men arbeiðið er nú liðugt, og seinnapartin í dag letur høllin so uppaftur.

**sb.**